# Próvtøkur á Føroya Sjómansskúla



**Hósdagin 18. desember fingu heimaskiparar, skiparar og skipsførarar prógv á Føroya Sjómansskúla**

*Heimaskiparar: Kenneth Strøm Bech, Vágur, Knút Brandal, Klaksvík, Gundur Gaardbo, Søldarfjørður, Hans-Kári Fríðrik Jacobsen, Vestmanna, Torbjørn Jacobsen, Kaldbak, Sigvald Kristiansen, Strendur, og Hans Petur Samuelsen, Haldórsvík.*

Hesir heimaskiparar fingu premiu: Sigvald Kristiansen fekk klokkusett frá Tryggingarfelagnum Føroyar, Knút Brandal fekk kikara frá J.C. Hempels Legatfond, Hans-Kári Fríðrik Jacobsen fekk bøkurnar, Alisfrøði, Fiskivinna og Fiskivinnumál 1-3, frá Føroya Fiskimannafelag.

*Mynd: Jens Kristian Vang*



***Skiparar:*** *Brian Anthoniussen, Tórshavn, Kenneth Strøm Bech, Vágur, Jónhard Frederiksberg, Gøtueiði, Rúni Gregersen, Glyvrar, Bergur Gudmundsen, Vágur, Øssur Hentze, Fuglafjørður, Arnfinn Jacobsen, Fuglafjørður, Pauli Joensen, Tórshavn, Niels Pauli Einarson Justinussen, Leirvík, Jákup Eli Lauritsen, Mykines, Kjartan Mohr, Tórshavn, Magnar Haldur Næs, Hvalba, Tóki Róin, Fuglafjørður, Sámal Sivertsen, Klaksvík, Fróði Sørensen, Tórshavn, og Eddie Strøm, Vágur, og Djóni Kári Thomassen, Miðvágur.*

Hesir skiparar fingu premiu: Sámal Sivertsen fekk barograf frá Skipara- og Navigatørfelagnum, Magnar Haldur Næs fekk klokkusett frá Føroya Sparikassa, Tóki Róin fekk pennasett frá Dansk Navigatørforening

*Mynd: Jens Kristian Vang*



***Skipsførarar:*** *Victor Andreasen, Hoyvík, Jan Eidesgaard Høghamar, Eiði, Marius Fríðálvur Joensen, Norðskáli, Pætur Háberg Johansen, Tórshavn, Jóhan Óli Müller, Kvívík, Bjarni Poulsen, Hvalba, Jógvan Sigurd Sivertsen, Norðdepil, og Óli Vejhe, Porkeri.*

Hesir skipsførarar fingu premiu: Victor Andreasen fekk eitt ur frá Rederiet A.P. Møller, Jóhan Óli Müller fekk kikara frá Skipafelagnum Føroyar, Jan Eidesgaard Høghamar fekk pennasett frá Dansk Navigatørforening

*Mynd: Jens Kristian Vang*



# Krútsterkt felag sleppur nú at gera nýggjar íløgur

**Tryggingarfelagið Føroyar er blivið partafelag og kann gera íløgur í heilt nýggj vinnuøki. Felagið, sum hevur eginpening omanfyri 1,2 milliardir krónur, fer at finna sær nýggj virkisøki í framtíðini. Stjórin vil einki siga um, hvat tær tøku 900 milliónir skulu brúkast til**

NÝGGJAR TÍÐIR

*Eyðun Klakstein*



*Tryggingarfelagið Føroyar kann nú gera íløgur í heilt nýggjar vinnur, og við einum eginpeningi omanfyri 1,2 milliardir eru møguleikarnir fyri íløgur nógvar*

Hósdagurin var ein søguligur dagur hjá Tryggingarfelagnum Føroyar.

Ja, tað var ein stórhending í føroyska fíggjarheiminum.

Størsta umskipan í Føroyum nakrantíð gjørdist veruleiki tá ið umboðsráðið í felagnum einmælt samtykti at broyta Tryggingarfelagið frá at vera eitt sínaámillumfelag til at fáa nýggjan holdingbygnað.

Hetta ger, at Tryggingarfelagið Føroyar nú verður lutvíst leyst av teimum avmarkingum, sum tað hevur havt hangandi yvir sær í lógini um tryggingarvirksemi, og kann fara undir heilt nýtt virksemi.

– Vit eru eitt sera sterkt felag fíggjarliga. Skulu vit virka á besta hátt, so er tað neyðugt við víðari karmum, og tað fáa vit við hesi umskipan, sigur Gunnar í Liða, stjóri.



*– Tryggingarfelagið hevur verið eitt konservativt felag, og tað verða vit eisini framyvir. Fara vit undir nýggjar vinnur, so verður tað við umhugsni og varsemi, sigur Gunnar í Liða, stjóri fyri Tryggingarfelagið Føroyar*

## Ger seg leyst av bindingum

Nýggi bygnaðurin í Tryggingarfelagnum Føroyar er nú tann, at Ognarfelagið Tryggingartakarana eigur Tryggingarfelagið Føroyar Holding P/F. Hetta felag umsitir allar ognirnar hjá Tryggingarfelagnum og er bara bundið av vanligu partafelagslógini.

Tað verður síðani dóttirfelagið Tryggingarfelagið Føroyar P/F, sum framyvir skal reka tryggingarvirksemið, og Holdingfelagið hevur skotið 300 milliónir krónur inn sum eginpeing í dóttirfelagnum. Felagið, sum skal reka tryggingarpartin, verður eisini framyvir bundið av lógini um tryggingarvirksemi.

## 900 milliónir til nýggjar íløgur

Við samlaðum eginpeningi upp á meira enn 1,2 milliónir krónur er skjótt at rokna út, at einar 900 milliónir liggja eftir í Holdingfelagnum, sum kunnu brúkast til at gera nýggjar íløgur fyri, og tað ætlar Tryggingarfelagið at gera.

– Enn kann eg einki siga um, hvat vit ætla okkum at gera. Tryggingarfelagið hevur verið eitt konservativt felag, og tað verða vit eisini framyvir. Fara vit undir nýggjar vinnur, so verður tað við umhugsni og varsemi, sigur Gunnar í Liða, sum er stjóri í bæði Holdingfelagnum og í Tryggingarfelagnum.

*Fara tit undir bankavirksemi?*

– Tú kanst hugsa, hvat sum helst, men eg sigi einki, fyrr enn tíðin er búgvin til tað.

## Tryggingartakarar somu ávirkan

Tryggingartakararnir skulu eisini framyvir velja umboðsráðið fyri Tryggingarfelagið, og tí varðveita teir somu ávirkan, sum teir hava havt higartil.

Umboðsráðið velir so eina nevnd fyri Tryggingarfelagið Føroyar Holding P/F, og hendan nevndin er tann sama, sum hevur verið fyri Tryggingarfelagið. Formaður fyri nevndini er Trúgvi Guttesen.

Gunnar í Liða er stjóri í bæði Holdingfelagnum og felagnum, sum rekur tryggingarvirksemið.

# Nýtt felag ætlar at keypa bygningar

**SMS, Handilskjarnin og Kaupthing hava gjørt nýtt felag, sum skal keypa, reka og leiga út fastognir. Nýggja felagið hevur sum tað fyrsta keypt bygningarnar hjá SMS og Handilskjarnanum, men ætlanin er, at felagið skal vaksa munandi**

NÝTT FELAG

*Eyðun Klakstein*

Fastognarfelagið Føroyar.

Tað er navnið á nýggjum felagum, sum skal vinna pengar burtur úr fastognum í Føroyum.

SMS, Handilskjarnin og Kaupthing eiga nýggja felagið, og fyrsta keypið er longu gjørt. Fastognarfelagið hevur keypt bygningarnir hjá SMS og Handilskjarnanum og hevur síðani leigað teir út til gomlu eigararnar.

Men tað er bara ein byrjan fyri virkseminum hjá nýggja felagnum.

Fastognarfelagið ætlar at vaksa munandi komandi tíðina, og sagt verður, at felagið ætlar sær at keypa størri og smærri bygningar til alskyns virksemi.

Í nevndini fyri nýggja felagið eru Hans Mortensen, Schumann Hjaltalin og Christian Andreasen.

Evy Jacobsen er settur sum stjóri í felagnum.

## Frændur spæla á Tvøroyri

Um vikuskiftið fara Frændur at spæla í Suðuroy, har teir ikki hava spælt í seks ár.

Frændur hava júst givið út nýggja savnsfløgu við øllum teirra fýra uppruna útgávum. Hesin fløgupakkin er væl umtóktur í jólasøluni.

Frændur fara at spæla tvær ferðir nú áðrenn jól. Fríggjakvøldið spældu teir á Eclipse í høvuðsstaðnum, og leygarkvøldið eru teir í Suðuroy. Har fara teir at spæla í TB-húsinum, og tað eru liðin heili seks ár, síðani teir vóru í Suðuroy seinast og spældu.

Millum jóla og nýggjárs verða Frændur ein av bólkunum, sum fara at spæla á nýggjárskonsertini í Havn. Tá spæla eisini Páll Finnur Páll og I AM.

## Nú er klárt til nýggjárskonsert

I AM, Páll Finnur Páll og Frændur fara at spæla á árligu nýggjárskonsertini hjá Kyndli.

Hetta eru bólkar sum hava verið nógv frammi seinastu tíðina.

Klaksvíksbólkarnir I AM og Frændur eru báðir aktuellir við fløgum. I AM hevur givið sína næstu fløgu út, og hon hevur selt sera væl. Frændur hava givið ein fløgupakka út við øllum sínum fýra plátum, og eisini hendan útgávan hevur selt væl.

Páll Finnur Páll hava í nógvar vikur átt populerasta sangin í Føroyum. Tað er um ein forelskaðan sjónleikara.

Atgongumerki verða nú seld í forsølu í Havn, Runavík, Miðvági, Vestmanna og Gøtudali, og bussar fara at koyra í sambandi við konsertina, sum verður leygarkvøldið 27. desember frá kl. 23.00.